# Nýggjársheilsanir

## Simon Kvamm



*Simon Kvamm var í Føroyum á Planet Awards*
*mynd: Jens Kr. Vang*

Her er den hilsen jeg kan komme op med har jo ikke været på Færøerne mere end en enkelt weekend i januar i år, så det er der ikke meget at sige om. Men så var der noget andet at sige noget om: En sommernat 2005 stod Nephew på den kogende og sydende strand i Syðru Gøtu og spillede til G!Festival, mens horder af festende færinge skreg og hoppede, så det medbragte sprut klirrede i rygsækkene. Det var en følelsesmæssigt voldsomt lun oplevelse. For undertegnede føltes det særligt varmt, da jeg som en del af den yngste generation af Kvamm slægten lod følgende ord gjalde udover publikum, fjorden og Støðlafjall: Abbi mín var gøtumaður

Til sommer kommer Nephew så tilbage til G Festival, men denne gang kan jeg ikke kalde mig yngste generation af min slægt længere. For nu har slægten fået endnu et led, personificeret ved en ung dame ved navn Elinor Kvamm Ellerbæk.

Så mon ikke, det denne gang blir ekstra hjertevarmt og familiært, og mon ikke der atter blir lejlighed til at klirre med flaskerne, når Nephew kommer Igen & Igen &!

Rigtig godt nytår til Science Fiction & Familien & Venner & Veninder på Færøerne; vores andet hjem.

**Kærligst**
**Simon Kvamm**

**PS:** Nephew vil gerne hermed invitere Rasmus Rasmussen med på scenen og spille guitar i sangen „Superliga"

## Mugison



*Mugison vitjaði G!Festivalin í summar*
*mynd: nud*

I´d like to thank all the people in Faroes for getting me over and play, and showing me such a good time, wow it was fun fun fun fun. I´d come over any day.

May next year be the best year in the history of the Faroes, may health and prosperity blossom and good hearts lead the way.

All the best

**Mugison**



*Eivør Pálsdóttir stjól myndina á Fróstrósu tiltakinum*

*Mynd: Bárður Eklund*

# Fróstrósir í íslendskum sjónvarpi

**Fróstrósu konsertin við Eivør, Sissel Kirkjebø og hinum divunum varð send í íslendskum sjónvarpi á Nýggjárinum, men føroyski sjónvarpshyggjarin má bíða leingi, áðrenn hann sleppur at síggja sendingina, um hann nakrantíð sleppur tað**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrst í desember stjól Eivør Pálsdóttir myndina á Frostrósu tiltakinum í Reykjavík um árskiftið sendi íslendska sjónvarpið tiltakið.

Tiltakið savnaði nakrar av fremstu divunum í Evropa, Eleftheria Arvanitaki, Patricia Bardon, Ragnhildur Gísladóttir og Sissel Kirkjebø og Eivør Pálsdóttir, saman við gestunum Petula Clark og Jóhann Friðgeir Valdimarsson. Tiltakið fekk gott pláss á størstu sjónvarpsrásini, tí hjá sjálvum Ríkisútvarpinum. Sendingin byrjaði gamlaárskvøld kl. 23.30 og eftir ein lítlan steðg í sambandi við árskiftið, helt sendingin fram kl. 00.05.

Sendingin liggur ikki enn á heimasíðunihjáíslendskaSjónvarpinum, úr Sjónvarpinum í Føroyum verður sagt, at talan er um tiltak við jólasangum, og av hesi orsøkhava tey valt ikki at keypa sendingina á hesum sinni, tí jólini eru farin afturum. Tó er ein møguleiki fyri, at Sjónvarpið velur at keypa sendingina til komandi jól.

Eftir konsertina valdu bæði Morgunblaðið og Seð & Heyrt Eivør at vera ta bestu av evropeisku divunum.

# Sasa Sa, Sa varð ársins hitt

**Georg eystan Á klassikarin Sasa Sa, Sa, ið nýtulkingini hjá The Dreams gjørdist ársins lag á 15 teimum bestu**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nýggjársaftan tók 15 tær bestu samanum árið, ið fór. Tá avtornaði var greitt, at ársins best umtókta lag var

Georg eystan Á klassikarin Sasa Sa, Sa, ið nýtulkingini hjá The Dreams. Lagið lá 15 vikur á 15 teimum bestu, áðrenn tað fall fyri tíðaravmarkingini hjá sendingini. Teitur og Louis Louie var á øðrum plássi og Høgni Lisberg Learn To Ride On Waves, megnaði at gera allan top 3 á almenna føroyska hittlistanum føroyskan. Simon Kvamm gav við lagnum Igen & Igen &, eitt lítið føroyskt íslett til 4. plássið. Annars vóru ikki færri enn 9 av teimum 20 best umtóktu løgunum føroysk, og hetta vitnar um eitt gott tónleikaár.

Tað vóru 44 15 tær bestu sendingar í 2006. Í teimum royndu 220 ymisk eykaløg seg, av teimum 40 føroysk eykaløg. 113 løg komu inn á listan, av teimum 32 ið vóru føroysk. 14 ymisk løg løgu á fyrsta plássi, bert 5 løg vóru tær 15 vikurnar inni á listanum. Eitt lag; Learn To Ride On Waves hjá Høgna Lisberg, fall tó eisini fyri tíðaravmarkingini, men hevði verið tríggjar vikur á listanum í fjør. Einans 16 løg vóru meira enn 10 vikur inni á listanum. Tað hava veri 52.502 vitjanir á síðuni hjá 15 teimum bestu og 28.050 av teimum hava greitt atkvøðu, Tað gevur í miðal 637,5 atkvøður pr. sending.

| Nr. | Vikur | Max | Vikur nr.1 | Vikur nr.2 | Støða í miðal | Bólkur/Einstaklingur og Lag |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 15 | 1 | 11 | 2 | 1,466 | The Dreams - Sasa Sa, Sa |
| 2 | 10 | 1 | 6 | 2 | 2,1 | Teitur - Louis, Louis |
| 3 | 12 | 1 | 5 | 3 | 2,25 | Høgni Lisberg - Learn To Ride On Waves |
| 4 | 10 | 1 | 5 | 3 | 2,4 | Nephew - Igen & Igen & |
| 5 | 10 | 1 | 4 | 3 | 3 | James Blunt - Goodbye My Lover |
| 6 | 8 | 1 | 3 | - | 3,875 | The Dreams - Nummar |
| 7 | 6 | 1 | 1 | 1 | 4 | BassHunter - Boten Anna |
| 8 | 13 | 2 | - | 1 | 4,0769 | Robbie Williams - Advertising Space |
| 9 | 9 | 1 | 2 | 1 | 4,1111 | Black Eyed Peas - My Humps |
| 10 | 5 | 2 | - | 2 | 4,2 | Lordi - Hard Rock Hallelujah |
| 11 | 10 | 2 | - | 2 | 4,3 | Týr - Wings Of Time |
| 12 | 15 | 1 | 2 | 2 | 4,3333 | Høgni Lisberg – Just Dig |
| 13 | 7 | 2 | - | 3 | 4,4285 | Eb/Streymur - Vit skora mál |
| 14 | 13 | 1 | 1 | 3 | 4,5384 | Red Hot Chili Peppers - Dani California |
| 15 | 15 | 1 | 1 | 3 | 4,7333 | Kelly Clarkson - Because of You |
| 16 | 6 | 4 | - | - | 5,166 | Makrel - Filthy Tongue |
| 17 | 12 | 2 | - | 2 | 5,5 | Marius - The Sky Is Our Home |
| 18 | 5 | 4 | - | - | 5,6 | Justin Timberlake - My Love |
| 19 | 12 | 4 | - | - | 5,75 | Wyclef Jean & Shakira - Hips Don't Lie |
| 20 | 13 | 1 | 1 | 2 | 6 | Pink - Stupid Girls |